## Tvingsilssøla

31. mai 2011, kl. 10:15, verður á Dómaraskrivstovuni, C. Pløyensgøtu 1, 100 Tórshavn, hildin tvingsilssøla yvir ognina matr.nr. 24 v, Velbastaður (AS nr. 2-34/2011).

Talan er um óbygt grundstykki, liggjandi á Gerðisbreyt 15, Velbastaður. Sambært tingbókini er samlaða víddin á grundstykkinum 512 m2.

Tvingsilssølan er umbiðin av Jógvan E. Ellefsen, adv., Yviri við Strond 4, 100 Tórshavn, tlf. 203040 (sak nr. 5244201), sum kann geva nærri upplýsingar um ognina.

Tvingsilssøluuppgerð kann umbiðjast hjá nevnda advokati ella hyggjast ígjøgnum á Dómaraskrivstovuni.

*Føroya Fútarættur*

ÚTBJÓÐING

## Nýggjur tyrlupallur á Kirkju

Við hesum verður arbeiðið at gera nýggjan tyrlupall á Kirkju boðið út í almenna lisitatión sum høvuðsarbeiðstøka.

Arbeiðið fevnir í høvuðsheitum um:
- Gerð av nýggjum tyrlupalli
- El- og HVS innleggingar
- Nýtt avgreiðsluhús
- Regulering av verandi íbindingarvegi

Lisitatiónin verður á Landsverki, Tinghúsvegi 5, hósdagin 12. mai 2011, kl. 14.00.

Útbjóðingartilfarið kann bíleggjast frá týsdegi 26. apríl 2011 við at venda sær til:

Landsverk,
Tinghúsvegur 5,
Postsmoga 78,
FO-110 Tórshavn
btl@lv.fo

- og verður útflýggjað frá fríggjadegi 29. apríl 2011.
Tá biðið verður um útbjóðingartilfar, skal upplýsast:

- Navn og bústaður á virki
- Kontaktpersónur og telefonnummar
- Teldupostadressa
- Vinnutal

SENDISTOVAN

Landsverk, Tinghúsvegur 5, Postsmoga 78, 110 Tórshavn | Tel. 340 800, Faks 340 801, lv@lv.fo, www.landsverk.fo

LANDSVERK byggir land

*Landsverk er ein stovnur undir Innlendismálaráðnum og hevur um hendi vega- og havnamyndugleikauppgávur og byggiharrauppgávur. Stovnurin ráðleggur og ger ætlanir, útinnir, rekur og viðlíkaheldur landsvegir, havnir, bygningar og flogvallamál, herundir tyrlupallar.*

javni

## JAVNA fagnaður og JAVNA veitsla

**Í sambandi við 40 ára stovningardagin hjá JAVNA verður stórfingin Javnafagnaður og Javnaveitsla leygardagin 14. mai 2011.**

### SKRÁIN FYRI DAGIN:

**Kl. 12 Javnafagnaður**
Har vit øll, bæði stór og smá, ung og gomul ganga skrúðgongu við ballónum frá Hoydalsvegi 40 oman á Vaglið.

Við í skrúðgonguni eru: Havnar Hornorkestur, reiðfólk, tveir gamlir brandbilar og so øll vit glaðu menniskju.

Á Vaglinum heldur løgmaður, Kaj Leo Johannesen røðu. Havnar Hornorkestri spælir.
Og so fara Angela og Hannebal at framføra skemt.

**KOMIÐ ØLL VIÐ** og setið dám á tiltakið ☺

### KL. 18 VERÐUR »ÁRSINS VEITSLA« Í HØLLINI HJÁ DANSIFRØI Í GUNDADALI

**Har verður: Móttøkudrykkur, 3 rættir við vatni/víni, røður, skemt, felagssangur og dansur.**
Á skránni verður eisini vælumtókta lutaseðlasølan við góðum vinningum.
Borðstjóri verður Rasmus Magnussen, sum eisini fer at spæla til dansin.

**Kostnaður:**
Børn undir 7 ár: 50 kr.
Børn og ung millum 7 og 18 ár: 100 kr.
Vaksin: 250 kr.

Tilmelding til veitsluna verður gjørd við at gjalda upphæddina á konto 6460 153.962.2 í Bank Nordic **í seinasta lagi hósdagin 5. mai 2011.**

Kvittan við nøvnum á gestunum verður nýtt sum atgongumerki.

**MØTIÐ FJØLMENT** og gloymið ikki veitsluhýrin ☺

Javni

**4 summardekk**
Toyota Corolla v/felgu til sølu

Tlf. 370368

**Pensionistafelagið í Havn**
Mikudagin 4. mai kl. 18.00 hevur felagið bingo í Losjuni.

HOSTEL.FO

# STARVSLÝSING

Søkt verður eftir røskum ábyrgdarfullum fólki til gistingarhúsið Hostel.fo

Starvið fevnir um reingerð, geran av morgunmati og aðrar skiftandi uppgávur.

Vit vanta at tú er tænastusinna/ur, flexibul og kann arbeiða sjálvstøðugt.

Vanlig arbeiðstíð er 4 til 6 tímar um dagin.

Skiftandi arbeiðstíðir og longri dagar kunnu koma fyri.

Umsóknir skulu sendast sum teldupostur til hostel@hostel.fo

Hostel.fo
Dr.Jakobsensgøta 14-16
100 Tórshavn

Innan 2. mai. Starvið verður sett skjótast gjørligt.

umhvørvisstovan
ENVIRONMENTAL AGENCY

## FRÁBOÐAN UM UMHVØRVISGÓÐKENNING

Við hesum verður gjørt kunnugt, at Umhvørvisstovan tann 28. apríl 2011, við heimild í § 29 í løgtingslóg nr. 134 frá 29. oktober 1988, um umhvørvisvernd, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 128 frá 22. desember 2008, og § 1, nr. 4 í kunngerð nr. 54 frá 3. mai 1994, um at leggja eftirlits- og umsitingaruppgávur eftir umhvørvisverndarlógini til Umhvørvisstovuna, sum broytt við kunngerð nr. 90 frá 28. september 2007, hevur góðkent:

**Elverkið á Sundi**

Góðkenningin liggur alment frammi á Umhvørvisstovuni. Avgerðin kann kærast til landsstýrismannin við umhvørvismálum. Møgulig kæra skal sendast Umhvørvisstovuni, Traðagøta 38, FO-165 Argir, í seinasta lagi fýra vikur frá dags dato.

Góðkenningin kann somuleiðis síggjast á heimasíðuni hjá Umhvørvisstovuni, www.us.fo.

**Umhvørvisstovan**
Boks 2048 · Tlf. 342400
FO-165 Argir · us@us.fo
www.us.fo

**Frá Stráluni**
Gott bingo á Strondum sunnudagin 1 mai kl 16.
Burturlutað verður m.a. gávukort á 2000 kr og 1000 kr.
Eisini lúkur og eykavinningar. Størsti vinningur á hjólinum er gávukort á 10000 kr.

Strálan

**Skrivstova v.m. til leigu**
Skrivstova við øllum hentleikum, minni køki, wc við brúsu- og lítlum arkivi, á íalt uml. 25 fermetrar, til leigu í miðbýnum í Tórshavn.
Vælegnað til minni fyritøku ella líknandi.

ibudtn@gmail.com

FØROYA REIÐARAFELAG
FAROESHIPOWNERS´ASSOCIATION

# Ársaðalfundur í Føroya Reiðarafelag

Ársaðalfundur verður í Føroya Reiðarafelag tann 11. Mai 2011, kl. 13:00 á Hotel Hafnia

Skrá sambært viðtøkum felagsins

**Føroya Reiðarafelag**